# Trygt hjá Mjølni



Ein dystur í bestu mansdeildini í flogbólti varð leiktur um vikuskiftið, tá Mjølnir tók ímóti Fleyr.

Her var ikki roknað við nøkrum spenningi, og heimaliðið megnaði eisini uttan stórvegis hóvasták at vinna ein tryggan 3-0 sigur. Tey bæði seinnu settini lat Mjølnir eisini fleiri ungar og óroydnar leikarar sleppa at royna seg, men hóast hendan møguleikan, so megnaði Fleyr ongantíð at skala Mjølnir tað allarminsta.

Og eins og hjá kvinnunum, so er mansliðið hjá Mjølni nú til reiðar at fara eftir gullinum á seinasta leikdegi.

Her verður talan tó um eina sera trupla uppgávu, tá ÍF tekur ímóti. Mjølnir og ÍF hava í serflokki verið bestu liðini hetta kappingarárið, og spurningurin er so, hvør parturin hesa ferð hevur betra dagin.

\- jm

# Klárar til gullveitslu

**Kvinnurnar hjá Mjølni eru nú bert ein dyst frá gullinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eingin slingur í valsinum hja Mjølni, tá tær leygardagin høvdu vitjan av Fleyr í kappingini hjá kvinnum.

Mjølnir, sum hevur sett kósina beint móti 15. FM-gullinum, gjørdi alt fyri eitt greitt, at hetta so ikki skuldi vera nakar snávingarsteinur, og við 25-8 í fyrsta settinum vístu tær Fleyr, hvussu langt tað er upp til oddin hjá teimum.

Tey bæði seinnu settini vórðu ikki vunnin eins sannførandi, men fyrst og fremst komst hetta av, at Mjølnir nú lat fleiri av yngru og meira óroyndu leikarunum sleppa at royna seg, men hóast hetta, so var ikki tann heilt stóri vandin fyri, at Fleyr skuldi órógva tað allarminsta.

Við sigrinum tók Mjølnir tað, sum nógv rokna við var seinasta fetið móti gullinum. Enn kunnu tær snáva, men tað skal ikki roknast við, at hetta fer at henda á Kambsdali, har ÍF einki hevur at spæla fyri.

Júst ÍF hevði sunnudagin vitjan av KÍF, og tann dysturin gav ikki liðnum nakrar sum helst trupulleikar. Talan gjørdist um tryggan 3-0 sigur, og soleiðis sýndi ÍF, at tær á heimavølli avgjørt teljast millum sterkastu liðini, men um tað so er nóg mikið til at taka Mjølnir, er ein onnur søga.

Tað er annars einasta vónin, sum TB hevur eftir. Tær fáa í løtuni ikki gjørt stórt annað enn bara vinna sínar egnu dystir, og um vikuskiftið leiktu tær seg til ein tryggan 3-0 sigur á Drátti. TB hevði allan dystin á tamb eina greiða yvirvág, og tað er nokk einki at ivast í, at tær við hesum vildi vísa, at talan bara var um eitt mistak, tá tær taptu dystin á Giljanesi, men hvussu er og ikki, so var talan um eitt mistak av teimum heilt stóru. Somikið stórt, at tað tykist hava kostað teimum møguleikan fyri gullinum.



*Dráttur formáddi sær ikki tað heilt stóra móti TB, men tað hjálpti tó lítið hjá heimaliðnum, sum framvegis má seta seinastu vónina á ÍF, sum fær vitjan av Mjølni á seinasta leikdegi*

Søljan-Stjørnan 13-26 (7-12):

# Avgreiðslusigur til Stjørnuna

**Stjørnan gjørdi sína skyldu, tá ið tær vóru á vitjan á Giljanesi leygardagin. Frá fyrsta bríksli løgdu tær seg á odda, og spenningur kom ongantíð í dystin.**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Longu frá fyrsta bríksli í landskappingardystinum á Giljanesi leygardagin, vísti Stjørnan vágakvinnum, at tær vóru oddalið, og at tær ikki høvdu ætlanir um at taka sær av løttum vesturi í Vágum.

### Avgjørt eftir lítlari løtu

Dysturin gjødist ongantíð spennandi, tí Stjørnan legði beinan vegin sjógv millum seg og vertirnar úr Vágum, og longu tá ið eitt korter var leikt av dystinum, hevði oddaliðið úr Klaksvík avgjørt og lagt seg á odda við sjey málum 8-1!

Eftir hetta tók gestirnir tað eitt sindur meira róligt, og heimaliðið nýtti høvið til at minka nakað um munin, so at tá ið farið var til hálvleiks, var støðan 12-7 til Stjørnina.

Í seinna hálvleiki legði Stjørnan aftur hart út, og um miðjan seinna hálvleik høvdu tær lagt seg á odda við tíggju málum. Heimaliðið hevði stórar trupulleikar við at spæla seg gjøgnum verjuna hjá klaksvíkskvinnum, og av teimum seks málunum, ið Søljan fekk eftir steðgin, vóru tey trý skotin upp á brotskast. Nicoleta Radu brendi tvey av trimum teimum fyrstu brotskastunum, ið Søljan fekk í dystinum, og so tók Heidi Maria Akselsen yvir, og hon var ósvikaliga trygg við síni trý brotskøst.

Venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, brúkti dystin leygardagin eisini til at royna ymiskar uppstillingar. Leiðlsan hjá oddaliðnum var trygg, og tí fingu teir roynt eitt sindur av hvørjum undan avgerandi dystinum í Vági um knappar tvær vikur.

Stjørnan hevði ongar trupulleikar av at basa vágakvinnum, 26-13 í dystinum leygardagin, og tað verður spennandi at síggja, um tað fer at eydnast VB at koppa Stjørnuni, tá ið føroyameistaraheitið verður avgjørt í Vági 27 marts.



*Svein Rógvi Nielsen hevði ikki tørv á teimum stóru orðunum av beinkinum, tá Stjørnan leygardagin vitjaði á Giljanesi*

### Dysturin í tølum

**Søljan-Stjørnan 13-26 (7-12)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Nicoleta Radu 5(1), Heidi Maria Akselsen 4(3), Fía Selma Nielsen 3, Kristina Griksaite 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 6(3), Bára Skaale Klakstein 5, Anna Kristina Samson 4, Katarina Stepanov 4, Una Olsen 3, Annika Ljósstein 2, Joan M. Djordjevic 2
**Brotskøst:** Søljan 6(4), Stjørnan 6(3)
**Útvísingar:** Søljan 3, Stjørnan 2
**Dómarar:** Kristian Johansen og Sámal Hansen

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**

Mjølnir-Fleyr 3-0
(25-8, 25-22, 25-20)
TB-Dráttur 3-0
(25-12, 25-14, 25-22)
ÍF-KÍF 3-0
(25-20, 25-22, 25-20)

**Meistaradeild menn**

Mjølnir-Fleyr 3-0
(25-12, 25-10, 25-11)





*Brøndby mátti um vikuskiftið leggja rygg til størsta tapið í 27 ár, tá teir á heimavølli taptu 6-1 fyri Esbjerg*

# Spenningur kom í beinanvegin

**Eftir størsta Brøndby tapið í 27 ár eru fleiri feløg við í kappingini um meistaraskapin í Danmark, har áhugin fyri superliguni er størri enn nakrantíð áður**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum varð farið undir aftur landskappingina í Danmark. Sum tað hevur verið gjørt í mong ár, so fara vit her á síðunum at fylgja eitt sindur við og at vísa føroysku spælarunum og teirra feløgum áhuga. Tey, sum hava serligan áhuga fyri donskum fótbólti, fylgja sjálvsagt við í donsku miðlunum, har tað verður nýtt nógv tíð og orka at gera meiri burturúr enn nakrantíð áður.

Eftir at Brøndby var við í UEFA Cup kappingini og stóð seg toluliga ímóti Barcelona varð roknað við, at teir gulu og bláu fóru at vera eina tonn frammanfyri øll hini, tá ið tað aftur gjørdist álvari í superliguni. Men soleiðis vísti tað seg sunnudagin ikki at vera. Brøndby legði rygg til 6–1 tap á heimavølli ímóti Esbjerg. Tapið var fullkomuliga óvæntað. Brøndby hevur verið í bestu deildini í 24 ár, og teir hava ongantíð tapt so stórt sum ímóti Esbjerg sunnudagin. Tað skal leitast 27 ár aftur fyri at finna sovorna eyðmýking av Brøndby.

Tað verður vent og snarað, hvussu tað kundi bera til, at úrslitið frammanfyri 28.322 áskoðarum á Brøndby stadion skuldi gerast 6–1 til gestirnar. Leygardagin skal Brøndby til Odense, og tá fer tað at vísa seg, um talan var um einstakan svipsara. Í donsku kappingini eru nógvir svenskir spælarar, og fleiri teirra eru eyðsýndir. Sunnudagin var Fredrik Berglund fyrstu ferð á liðnum hjá Esbjerg. Hann skoraði tvey mál, og hann legði upp til trý onnur. Tað var vorðið sum svenskur fongur hjá Esbjerg, sum ikki tóktist ræðast grýlu, men leyp á frammarlaga á vøllinum.

## Danska superligan

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 21 | 14 | 4 | 3 | 45 | 22 | 23 | 46 |
| 2 Brøndby (S) | 21 | 14 | 4 | 3 | 36 | 20 | 16 | 46 |
| 3 FCK (M) | 21 | 12 | 6 | 3 | 33 | 17 | 16 | 42 |
| 4 OB | 21 | 11 | 5 | 5 | 45 | 30 | 15 | 38 |
| 5 AaB | 21 | 9 | 6 | 6 | 31 | 27 | 4 | 33 |
| 6 FCM | 21 | 7 | 5 | 9 | 35 | 35 | 0 | 26 |
| 7 AGF | 21 | 8 | 2 | 11 | 31 | 42 | -11 | 26 |
| 8 Viborg | 21 | 6 | 7 | 8 | 31 | 29 | 2 | 25 |
| 9 Herfølge | 21 | 6 | 5 | 10 | 23 | 29 | -6 | 23 |
| 10 FC Nordsj. | 21 | 4 | 7 | 10 | 25 | 38 | -13 | 19 |
| 11 Frem | 21 | 4 | 3 | 14 | 23 | 40 | -17 | 15 |
| 12 AB | 21 | 3 | 2 | 16 | 18 | 46 | -28 | 11 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

### FCK og OB nærri toppinum

Esbjerg er nú topplið í superliguni. Teir hava sama stigatal og betri málmun enn Brøndby. OB og FCK, sum hava føroyskar spælarar í felagnum, vunnu og mugu nú roknast at vera við í meistarastríðnum.

Jákup á Borg var ikki á OB liðnum, sum á heimavølli vann 4–0 á FC Midtjylland. Sigurin var serliga søtur hjá OB venjaranum, Troels Bech, sum í heyst fekk sekkin í FCM. Jákup á Borg var millum áskoðararnar. Seinnapartin í gjár skuldi hann spæla á næstbesta liðnum hjá OB. Teir skuldu spæla í Viborg.

Todi Jónsson var millum áskoðararnar, tá ið FCK leygardagin vann 2–1 í Valby. Todi skal seinnapartin í dag spæla fyri fyrstu ferð í meiri enn fimm mánaðir, tá ið teir næstbestu hjá FCK skulu spæla ímóti Frem. Leygardagin høvdu tey í Frem lagt upp til, at talan var um stættarstríð millum arbeiðarafelagið í Valby og kapitalistarnar á Frederiksberg, sum tað varð nevnt í leikskránni.

Á vøllinum var eingin ivi um, at tað var FCK, sum var betri fyri. Men tað var kortini ikki meiri enn akkurát, at FCK, sum misnýtti einar seks upplagdar møguleikar, vann 2–1. Eftir steðgin kom Frem á odda eftir eitt av fáu álopunum. Hans Backe skifti so Zuma út við Peter Møller, og FCK skoraði tvey mál. Tað fyrra stútaði Thomas Røll, eftir at Álvaro Santos hevði spælt hann leysan, og hitt seinna skoraði Álvaro Santos, eftir at Thomas Røll hevði spælt hann leysan. Í síðstu løtu hevði Frem møguleika at javna, men Magnus Kihlsted í FCK málinum vardi væl.

### Høvuðsstaðurin á botni

Frem er næstniðast, og eitt felag aðra staðni í høvuðsstaðnum er niðast. Talan er um AB, sum heldur til í Bagsværd og spælir í Gladsaxe, og sum hevur tað strevið – bæði ítróttarliga og fíggjarliga. Leygardagin taptu teir 2–1 ímóti Herfølge, sum harvið legði sjógv millum seg og tey bæði niðanfyri strikuna.

Hjá AGF var tað stórt vónbrot, at tað á heimavølli ikki eydnaðist at fáa nakað burturúr. AaB vann 1–0. Viborg fekk málleysan javnleik á heimavølli ímóti FC Nordsjælland. Stóri maðurin hjá Viborg var nýggi málverjin, Jesper Christiansen.

Í vikuskiftinum vóru fleiri og hugdu at fótbólti, enn tað nakrantíð hava verið, síðani superligan sá dagsins ljós í 1992. 74.855 áskoðarar var óvanliga nógv. Serliga tá havt verður í huga, at eingin dystur var í Parkini, har tað plaga at vera nógvir áskoðarar. Fyrsti landskappingardysturin í Parkini eftir vetrarsteðgin verður sunnudagin, tá ið FC Midtjylland skal vitja FCK. Esbjerg skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti AGF, og í Odense verður talan um oddabrak, tá ið Brøndby fer at vitja OB.

# Christian Høgni á blettinum

**Tá ið Fremad Amager vann síðsta venjingardystin, vóru tríggir føroyingar millum teir fyrstu ellivu**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum fer bólturin á rull aftur í næstbestu donsku deildini, har fleiri føroyingar enn nakrantíð áður eru millum spælararnar.

Týsdagin hevði Vejle vitjan av Esbjerg, sum hevði nógvar eykamenn á liðnum. Vejle vann 2–0, og Christian Høgni Jacobsen, sum var annar av álopsmonnunum, skoraði í 2. hálvleiki seinna málið. Ian Højgaard spældi síðstu løtuna á Vejle miðvøllinum.

Í vikuskiftinum spældi Fremad Amager síðsta venjingardystin. Hann var ímóti Skjold, sum eisini hoyrir heima í næstbestu deildini. Fremad Amager vann 2–0. Teir fingu bæði málini síðstu løtuna.

Frá fyrsta bríksli var Jann Ingi Petersen á miðvøllinum, og álopið var mannað av Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør. Jann Ingi varð skiftur út í steðginum, og álopsspælararnir vórðu báðir skiftir út, tá ið ein tími var farin, og tað framvegis var málleyst.

Hjalgrím Elttør kom aftur á vøllin, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Hann loysti annan vongverjan av. Tað spældi ikki so væl av, tí stutt undan leikloki sá Hjalgrím reyða kortið!